# Hvat verður av teimum, sum detta uttanum skipanina?

- Óboðið hoyringsskriv til Løgtingsfíggjarlógina 2025

Mánadagur 7. oktober 2024, Tórshavn

Í fleiri Løgtingsfíggjarlógum á rað, hava munandi skerjingar av ymiskum slag verið á handikapsøkinum, sum í fleiri førum hevur rakt giktaøkið serliga meint. Í Løgtingsfíggjarlógini hesaferð er góð orsøk at halda, at giktaøkið enn einaferð verður rakt.

Í Løgtingsfíggjarlógini, undir kontu 12.21.7.02 um Arbeiðsfremjandi tiltøk (Lógarbundin játtan) stendur skrivað:

> *"Lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk er lagt fyri Løgtingið. Broytingin hevur við sær, at persónur, ið lýkur aldurstreyt til framskundaða pensjón, ikki kann fáa nýggja játtan til lønarískoyti til tillagað starv. Eisini verður treytin um skert arbeiðsføri broytt soleiðis, at frameftir skal arbeiðsførið vera skert við í minsta lagi einari helvt fyri at fáa lønarískoyti til tillagað starv. Í dag kann persónur, sum hevur skert arbeiðsføri við 1/3 fáa lønarískoyti til tillagað starv. Mett verður, at játtanin kann lækka við 2 mió. kr. í 2025."*

Skerjingin í uppskotinum merkir sostatt, at virkisførleikin hjá tí einstaka skal verða mettur at verða munandi verri enn í dag, sum merkir, at gáttin at sleppa í skipanina verður hækkað, í og við at farið verður frá ⅓ mistum arbeiðsføri til ½ mistum arbeiðsføri.

Um tað síðan verður hugt inn á viðmerkingarnar til nevnda lógaruppskot, verður tað nevnt Uppskot til løgtingslóg (LM-017/2024) um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Aldursmark ásett og hert krav um skert arbeiðsføri til tillagað starv o.a.). Í uppskotinum, punkt. 2.1., stendur at:

> *"Tað ber ikki til at meta um, í hvussu stóran mun persónar, sum ikki fara at fáa rætt til tillagað starv, fara at fáa aðrar almannaveitingar."*

Sostatt er Føroya Løgting í ferð við at skerja atgongdina til skipanina munandi, uttan at vita, hvat so verður av teimum, sum í dag hava rætt til tillagað starv, men sum við hesum uppskotinum fella uttanum. Hetta er, um nakað, at sleppa fólki á fjall.

Giktafelag Føroya metir, at tað er góð orsøk at halda, at uppskotið um at herða treytirnar í lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk serliga rakar giktaøkið, tí sambært hagtølum frá Almanna- og mentamálaráðnum er tað út við ein triðingur av teimum, sum enda í tillagaðum starvi ella gerast fyritíðarpensjonistar, enda har orsaka av gikt. Tí metir felagið eisini, at Giktafelagið eigur at verða hoyrt í øllum málum, sum hava við hesi viðurskiftir at gera.

Felagið hevur spurt Almanna- og mentamálaráðið um hvussu væl umboðað giktarakt fólk eru í hesum skipanum. Í mars 2023 svaraði stjórnarráðið at tað ikki er samband millum útgjaldsskipanir og diagnosur, sum merkir, at tað ikki ber til at siga við vissu, hvussu nógv fólk við gikt ella øðrum sjúkum enda í hesum skipanum. Men, tá ið fólk fáa játta eina almannaveiting, verður sjúkuorsøk skrásett, sum liggur til grundar fyri avgerðini um at játta veitingina. Sjúkuorsøkin er tá at rokna sum verandi høvuðsorøk, sum er berandi fyri avgerðina.

Út frá hesum og øðrum fyrivarnum eru fylgjandi hagtøl send Giktafelagnum.

**Tillagað starv**

| Játtanir orsakað av giktasjúku | |
|---|---|
| Ár | Fólk |
| 2020 | 29 |
| 2021 | 22 |
| 2022 | 15 |

| Samlaðar játtanir | | |
|---|---|---|
| Ár | Fólk | Fólk við gikt í % |
| 2020 | 100 | 29.0 % |
| 2021 | 72 | 30.6 % |
| 2022 | 92 | 16.3 % |

**Fyritíðarpensjón**

| Játtanir orsakað av giktasjúku | |
|---|---|
| Ár | Fólk |
| 2020 | 87 |
| 2021 | 93 |
| 2022 | 77 |

| Samlaðar játtanir | | |
|---|---|---|
| Ár | Fólk | Fólk við gikt í % |
| 2020 | 302 | 28.8 % |
| 2021 | 311 | 29.9 % |
| 2022 | 302 | 25.5 % |

Hagtølini sum nevnd eru, hava sum sagt ávísar óvissur, og tað ber ikki til at yvirføra hesi tølini á restina av fyritíðarpensjonistum og fólki í tillagaðum størvum. Tí veruligu myndina kenna vit ikki, og tí er hetta tað tættasta vit koma.

Giktafelag Føroya metir tað ikki verða forsvarligt, at gera slíkar broytingar, uttan at feløg og borgarar, sum verða rakt av broytingunum verða hoyrd. Tí er tað ein óskikkur, ikki at hoyra Gikafelagið og onnur sjúklingafeløg í tilgongdini.

Felagið metir eisini, at tað ikki er ráðiligt at avtaka skipanir, uttan at kunna svara hvat kemur ístaðin fyri galdandi skipanir. Tá tað so úttrykkiliga stendur, at tað ikki ber til at meta hvat verður av teimum, sum detta uttanfyri skipanina, so eigur tað at verið tikið í størri álvara, og framhevja sum ein serliga inntrívandi broyting, sum eigur at verða svarað. Um hetta merkir, at hesi onga almannaveiting kunnu fáa, so eigur tað at standa greitt, so gjøgnumskygni er í málinum. Tí um ein politisk skipan avgerð, at hon vil niðurlaga livigrundarlagið hjá fólki, so má tann politiska skipanin gera tað á einum upplýstum grundarlagi.

Ein kann eisini seta spurnartekin við, hvørt tað veruliga er nøkur sparing við at fremja hesa broyting. Eitt er at viðmerkingarnar til lógaruppskotið staðfesta at *"... útreiðslur til aðrar almannaveitingar fara at hækka nakað"*, uttan at koma við nakrari meting um hvussu nógv. Men tað at fólk kunnu føla seg tvungin at arbeiða fulla tíð, inntil tey bert eru før at arbeiða 1/2 heldur enn 2/3, merkir sera sannlíkt, at fólk missa arbeiðs- og virkisførleika skjótari, og tí í longdini hava tørv á meira hjálp. Tað at lógaruppskotið er so illa lýst, ger tað eisini serliga átaluvert, at eingin hoyring hevur verið.

Felagið heldur eisini, at tað er ein keðilig gongd, sum vit síggja í okkara samfelag, tá almannaveitingar verða skerdar, sum fólk veruliga eru tengd at. Her tykist stundum at verða eitt manglandi forstáilsi hjá teimum, sum ráða, fyri teimum, sum ikki megna tað sama sum onnur.

Heldur enn at niðurlaga hesar veitingar, átti politiska skipanin heldur at styrkt skipanirnar. Og heldur enn at allatíð tosa um eitt búskaparligt haldføri, átti politiska skipanin at tosa um eitt sosialt haldføri.

Nevndin

*Giktafelag Føroya*